***Sløkkiliðið er politiskt- og fakliga stjórna av eini tilbúgvingarnevnd, sum er mannað soleiðis:***

| | |
|---|---|
| *Borgarstjóri* | *Fastur formaður.* |
| *Býráðslimur* | *Nevndarlimur.* |
| *Býráðslimur* | *Nevndarlimur.* |
| *Løgreglan* | *Nevndarlimur.* |
| *Tilbúgvingarleiðari.* | *Nevndarlimur* |
| *Kommunustjóri* | *Skrivari í nevndini.* |

***Dagligu umsitingina av sløkkiliðnum hevur tilbúgvingarleiðarin, sum er fyri alla kommununa.***

*Tilbúgvingarleiðari.*

*Vara-tilbúgvingarleiðari*

# Lønarviðurskifti

- *Fast telefongjald, útgoldið einaferð um árið í des...........................................................1,068.00 Kr.(árið)*
- *Samsýning á 583.33 Kr. Um mánaðin útgoldin 4 ferðir um árið..................................1,750.00 Kr.(árið)*
- *Fyri hvørja venjing, letur sløkkiliði.....................................................................................549,92Kr.*
- *Útkalling á degi- fyri 2 teir fyrstu tímarnar........................................................................549,92 Kr.*
  *Eftir fyrstu 2 tímarnir verður lønin sum handverkari.*
- *Fuglafjarðar sløkkilið ber kostnaðin av øllum áløgdum skeiðum, og fáa luttakrarnir handverkaraløn í tíðarskeiðum skeiði er eins og sløkkiliði endurrindar fyri heilsuváttan.*
- *1. Hjálparskeið ber Fuglafjarðar Sløkkilið kostnaðin av, tó uttan løn.*

## ***Royndarsetan***

Øll sløkkiliðsfólk M/K hava eina royndartíð uppá 1 ár, eftir hetta verður tikið avgerð um sløkkiliðsfólkið verður sett í fast starv.

## ***Uppmøting til venjing***

Í royndini at halda eitt munagott støði í arbeiðinum sum sløkkiliðsfólk, hevur leiðslan í tilbúgvingini ásett eitt minsta krav fyri uppmøting til venjing. Um sløkkiliðsfólkið ikki møtir til í minsta lagi 75% av venjingunum, kann tilbúgvingarleiðarin velja annan persón fyri viðkomandi. Í serligum førum, har umstøðurnar tala fyri tí, kann tilbúgvingarleiðarin síggja burtur frá hesi reglu.

## ***Virðisgrundarlag***

- At tú hevur áhuga í, at tæna borgarum og kommununi, tá ið fólk, djór, umhvørvi, virðir og ognir eru rakt av óhappi ella neyðstøðu, ella tá hóttandi vandi er fyri hesum.
- At tú hevur áhuga at samstarva í toymi, sum er ein av grundarsteininum í øllum sløkki- og bjargingararbeiði.
- At tú við áhuga luttekur í venjingum og tiltøkum annars, sum sløkkiliði fyriskipar.
- At tú við áhuga luttekur á skeiðum, áløgd av leiðsluni.
- At tú dugur at fylgja teimum boðum, ið tilbúgvingarleiðarin og/ella átaksleiðarin gevur, og evnar at taka sjálvstøðugar avgerðir, tá brúk er fyri tí.
- At tú dugur at síggja tað neyðuga í, at partar av teimum upplýsingum, sum sløkkiliðsfólk fáa innlit í grundað á hetta arbeiði, er tengt at tagnarskyldu.
- At virða leiðslubygnaðin, at tað í hesum sambandi er tilbúgvingarleiðarin, sum úttalar seg alment vegna sløkkiliði í Fuglafirði.
- At vera loyal/ur, bæði móti Fuglafjarðar Sløkkilið og starvsfeløgunum.

Viðgjørd av tilbúgvingarnevndini tann 23. mars 2021 og góðkend av Fuglafjarðar býráð tann

Fuglafjørður,

Dávur Juul

Borgarstjóri

Jan Lauritsen

Tilbúgvingarleiðari